

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 05 - 2012

# Teitur Poulsen gevst hjá Det Norske Oljeselskab

Føroyski oljumaðurin - fíggjarstjórin hjá norska oljufelagnum Det Norske Oljeselskab, Teitur Poulsen úr Havn, hevur gjørt av at gevast hjá Det Norske fyri at royna onkra aðra spennandi avbjóðing í altjóða oljuverðini. Tað hevur ikki eydnast oljan.fo enn at fáa at vita, hvat nýggja starvið verður. Men tað skilst, at hann eftir øllum at døma fer í enn eitt spennandi og avbjóðandi stjórastarv. Í eini tíðindaskrivi sigur norska oljufelagið, at tey harmast um, at Teitur Poulsen hevur avgjørt at gevast sum fíggjarstjóri hjá felagnum fyri at royna nýggjar avbjóðingar. Felagið, sum var við í tí risastóra oljufundunum Aldous í Noregi herfyri, hevur havt vind í seglunum seinastu tíðina. Teitur Poulsen hevur havt eina lyn karrieru í altjóða oljuvinnuni, frá leiðandi starvi hjá Faroe Petroleum til svenska Lundin og seinast til Det Norske.